# Louisa Udbø Jensen deyð

Týsdagin 9. juni andaðist Louisa Udbø Jensen á Heiminum við Vallalíð í Havn, 78 ára gomul.

Foreldur hennara vóru Jóhanna Elisabeth ættað úr Funningi og Johan Udbø úr Havn.

Louisa starvaðist frá ungum árum á skrivstovuni hjá Valdemar Lützen úti í Rættará. Seinni var hon nøkur ár á Frímerkjadeildini. Fyri fýra árum síðan flutti Louisa á Heimið við Vallalíð.

Louisa f. Udbø var gift við Tummas Jensen, prentara. Tommy, sum hann vanliga varð nevndur, var avlærdur á prentsmiðjuni hjá Fjúrtanda í Hornabø, og síðan var hann í starvi á prentsmiðjuni á Heygsbreyt. Tummas gjørdist rættuliga sjúkur og andaðist 42 ára gamal í 1975.

Á prentsmiðjuni á Heygsbreyt kom Tummas at starvast við Poul Karbech Mouritsen, vanliga nevndur Karbech, sum meistara. Báðir høvdu teir hvør í sínum lagi gávur sum góðir prentarar. Karbech við sínum lætta, prátingarsama lyndi, Tummas sum hin stillføri sum uttan nakran háva gjørdi sítt arbeiði, mest sum maskinsetari.



*Louisa Udbø Jensen og dótturin Sólrun*

Gott máloyra hevði hann – og ikki vóru manuskriptini hann fekk at seta eftir altíð so væl skrivað, men gjøgnum hendurnar á Tummasi var tað sum ein lúkandi hond mangan tók burtur nógva illgresið. Tá Tummas var farin av prentsmiðjuni, kom steðgur í. Eingin kendi og dugdi so væl at fara við teimum slitnu maskinunum sum hann, eingin annar hevði tol við teimum, tí fóru tær við honum.

Poul Karbech Mouritsen, sum sjálvur var málfróður maður, segði seg vera væl nøgdan við Tummas, ikki minst av tí, at hann hevði so gott máloyra – og hetta metti hann hava sín uppruna úr Fuglafirði, har hann segði fólkið tosa eina týðuligast, serliga endingarnar, og væl eisini eitt úrslit av góðum lærarakreftum.

Louisa og Tummas settu búgv við Traðavegin í Havn. Børn teirra eru Jóhan, Sólrun og Eydna, øll búsitandi í Havn.

**jl**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ester Gregersen** andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimið mikudagin, 86 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju leygardagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Ester, kunnu lata Eysturoyar Røktar- og Ellisheim eina peningagávu, konta í peningastovnunum..

**Gunnar Vestergaard,** vanliga nevndur Gunnar í bankanum á Tvøroyri, andaðist týsdagin, 84 ára gamal.

Kistan við **Bjarna Skaalum** í Vági fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18 í Vágs kirkju. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Bjarna, kunnu lata Vágs kirkju eina peningagávu, konta í Suðuroyar Sparikassa.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæra systir mín, fastir og mostir okkara

**Ester Gregersen**

andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi
mikudagin 10. juni, 86 ára gomul.
Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík
fríggjadagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju leygardagin kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sofus**

Tey, sum vilja minnast Ester, kunnu lata eina peningagávu til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim, konta í peningastovnunum.

# Gentur í gamla svimjihyli




Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her eru gentur í einum realskúlaflokki í svimjihylinum í Gundadali skúlaárið 1960/61.

**Genturnar eru f.v.:** Bjørg Rein, Ása Holm (Joensen), Torgerð Skaale (Hentze), Ása Joensen, Annelot Hentze (Rasmussen) og Súsanna Thomsen (Dam).

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 451).

*Myndaeigari: Torgerð Hentze*

# Tøkk



Hjartans tøkk til tykkum, ið gleddu meg á
80 ára føðingardegnum 9. febr.
Takk fyri gávur, heilsanir, sangir og blómur.
Eisini ein tøkk til tykkum, sum hjálptu til
og gjørdu mær dagin so hugnaligan
og minnisríkan.

**Bestu heilsanir**
**Herborg**

Lesið Sosialin - so eru tit við